# Bátastevnan verður 16. mai 2009

Bátastevnan komandi ár verður 16. mai. Hesum boðar VÍF frá, nú Bátastevnan 2008 er løgd afturum. VÍF takkar øllum fyri eina góða stevnu. - Vit veita eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum vitjaðu í Vestmanna og takk fyri, at tit gjørdu tað so hugnaligt at halda Bátastevnu í góðveðrinum hendan fagra dagin í mai. Takk til bygdafólkið og øll, sum hjálptu til og stuðlaðu tiltakinum, sigur VÍF, róðrarneystið. Sum nevnt omanfyri verður Bátastevnan aftur í Vestmanna leygardagin hin 16. mai 2009.



*Gott veður, nógvir bátar, fleiri húsvognar og nógv fólk... og sera gott lag á øllum*


























